# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*Vit kunnu ikki siga, at Rasmussen snýtti. Men hansara forsømilsir og lygnir kundu ikki verjast meira*

*Michel Proudhomme, stjóri fyri Tour de France*

# Lygnin sendi gulu troyggjuna heim

**Rabobank valdi í nátt at senda Michael Rasmussen heim. Danin, sum hevur súkklað í gulum seinastu dagarnar er enn ikki tikin fyri doping, men lygnirnar gjørdust ov stórar, og tað kostaði**

SÚKKLING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eg skilji nú, hvussu Lance Armstrong hevur havt tað teir mongu dagarnir, sum hann súkklaði í gulum. Og mín virðing fyri honum økist fyri hvønn dag.

Soleiðis fullu orðini, tá Michael Rasmussen kom á mál mikudagin, tá hann í imponerandi stíli trampaði einsmallur niðan eftir Col d'Abisque. Talan var um seinastu veruligu fjallaetapuna á Tour'inum, og við at fara einsamallur um málið staðfesti Rasmussen, at hann í ár var tann sterkasti av øllum í Tour de France. Enn er ein einkultstartur eftir í kappingini, men munurin niður til næstu súkklararnar var nú somikið stórur, eingin mundi ivast í, at Rasmussen eisini stóð í gulum, tá súkklararnir skuldu upp á pallin við Champs Ellysses.



*Tað líktist enn einum sigri til danska súkkluítrótt, tá Michael Rasmussen í fjár var fyrsti súkklarin um Col d'Abisque. Ístaðin gjørdist talan um enn eina gølu, eins og tað var, tá Bjarne Riis fyrr í ár viðgekk, at hann hevði nýtt EPO, tá sigurin í 1996 varð súkklaður heim*

*Mynd: Polfoto/AP*

## Leyg um Mexico-ferð

Orðini hjá Michael Rasmussen eftir sigurin skuldu síggjast sum ein reaktión upp upplivingina, sum áskoðararnir góvu honum á veg niðan eftir legendariska tindinum. Tí talan var als ikki um klapp og eggjandi róp. Tvørturímóti ýldu og bríksladu áskoðararnir. Kanska tí temum ikki dámar, at ein ikki-fraklendingur súkklar í gulum – tað hevur verið sæð fyrr. Men helst eisini tí fáur mundi trúgva, at Rasmussen var reinur.

Doping-ákærurnar hava støðugt fokið um høvdið á dananum, sum fýra ferðir hevur »gloymt« fráboðanarskyldu sína mótvegis dopingeftirlitinum. Og hóast hann ikki er testaður positivur, so fingu ákoyringarnar eyka ferð, tá ein fyrrverandi kenningur greiddi frá, at danin á sinni hevði roynt at fingið seg at smugla okkurt slag av heilivági til Italiu.

Fyri leiðsluna í Rabobank var tað tó vantandi fráboðanirnar, sum fingu bikarið at flóta yvir. Rasmussen hevur støðugt sag, at við seinastu av teimum fýra hendingunum var hann í Mexico, men hetta var tó ikki heilt satt. Herfyri segði fyrrverandi súkklarin og núverandi sjónvarpsfrásøgumaðurin, Davide Cassani, at hann hevði hitt Rasmussen í Italia ein av døgunum, sum hesin annars skuldi havt verið í Mexico. Sjálvur vísti Rasmussen hesum aftur, men sum skilst, so hevur hann tó váttað fyri stjórunum hjá Rabobank, The de Rooy, at hetta var satt.

Og so høvdu Rooy og hansara fólk fingið nóg mikið. Í nátt varð Michael Rasmussen strikaður av luttakaralistanum hjá liðnum.

## Ein læra fyri framtíðina

Eingin ivi er um, at skelkurin um hendingina fer at senda sínar ristingar gjøgnum altjóða súkkluítróttina. Men í løtunum eftir, at avgerðin hjá Rabobank var greið, var talan um rósur frá leiðandi persónunum.

Christian Proudhomme hevur fleiri ferðir verið atfinningarsamur mótvegis Rasmussen, og tó at hann ikki staðfestir nakra dopingmisnýtslu, so tóktist hann fegin um avgerðina.

Vit kunnu ikki siga, at Rasmussen snýtti. Men hansara forsømilsir og lygnir kundu ikki verjast meira, segði Proudhomme við AP.

Og forsetin fyri altjóða súkklusambandið, Pat McQuaid, var ikki ósamdur í hesum.

Eg kann bert taka undir við hesum. Tað er ein politikkur, sum prógvar, at vit hava ikki tolsemi mótvegis doping, og vónandi kann hetta vera ein læra fyri framtíðina, segði hann á tíðindafundinum.

# Holst skoraði í Odense

**Føroyski framherjin stóð fyri søguliga málinum, tá Lyngby fyri fyrstu ferð síðani húsagangin í 2001 fekk mál og stig í donsku superliguni**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Christian Lamhauge Holst skeyt sítt fyrsta superligumál, tá Lyngby í gjárkvøldið vitjaði í Odense. Holst fekk annars eisini bóltin í netið sunnudagin, tá Lyngby tapti 0-3 fyri Randers, men ta ferðina varð málið tó kolldømt. Tað varð tað tó ikki eftir bara 10 minuttum í Ådalen. Lyngby byrjaði við góðum trýsti móti OB, og teir høvdu eisini møguleikar at økja um leiðsluna, tó at hetta varð av ongum.

Sum dysturin leið, kom OB alt betri við í dystin. Og tað var eisini uppiborið, at innskifti Mads Timm eitt korter inn í seinna hálvleik kundi javna.

Seinastu løtuna átti OB alla sum hon var. Men fríspark varð dømt móti David Nielsen, tá hesin helt seg hava stútað sigursmálið í kassin, og í yvirtíðini hevði Jonas Borring gyltan møguleika at fáa fatur á øllum stigunum.

Tað fekk OB tó ikki, og so hevur Lyngby fingi ðsíni fyrstu superligustig, síðani felagið fór á húsagang fyri seks árum síðani.



*Christian Lamhauge Holst heldur fram við góðu avrikunum fyri Lyngby*

*Mynd: Polfoto*